# Javnstøða og føroyski veruleikin

**Skal nakað spyrjast burturúr, má javnstøðuarbeiðið leggja upp fyri tí veruleikanum, tað er ein partur av. Og føroyski veruleikin er ikki til reiðar at taka ímóti bráðfeingis kravboðum um til dømis kynskvotubýti. Gera vit tað kortini, hava vit ikki ein livandi kjans, tí so hava vit spilt alt frá byrjan, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í javnstøðumálum.**

VISIÓNIR FYRI JAVNSTØÐU
*Anna V. Ellingsgaard, anna@sosialurin.fo*



*Gongur tað, sum Hans Pauli Strøm ætlar, skal politiska skipanin plikta seg til at seta ítøkilig tiltøk í verk í javnstøðuarbeiðinum, áðrenn næsta løgtingsval*

Á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum mánadagin var tað litið landsstýrismanninum í javnstøðumálum, Hans Paula Strøm, upp í hendi, at leggja fram sínar visiónir fyri javnstøðu. Tað er ilt at vita, hvat fólk høvdu væntað, men tað er langt síðani, ein politikari hevur veri so bersøgin og realistiskur um hetta evnið. Og ikki minni forkunnugt var tað, at landsstýrismaðurin hevur sett sær fyri at seta ítøkilig tiltøk í verk longu áðrenn næsta val.

### Uppskot til samtyktar

Sum eitt tað fyrsta, fer landsstýrismaðurin at leggja fram eitt uppskot til samtyktar um at seta eina nevnd, hvørs arbeiðssetningur kann ljóða nakað soleiðis:

- at arbeiða fyri at fáa talið á kvinnum í løgtinginum upp á minst 25%, og talið á kvinnum í kommunustýrunum upp á minst 30% tey næstu 8 árini.

Nevndin skal enda sítt arbeiði við ein frágreiðing, sum verður handað landsstýrismanninum, so hann kann leggja hana fyri løgtingið til aðalorðaskiftis á Ólavsøku 2007. Hetta, fyri at politiska skipanin kann forplikta seg í hesum máli, tá umleið _ ár er eftir til næsta regluliga løgtingsval.

### Føroyski veruleikin

Ikki óvæntað, vildi onkur halda landsstýrismannin hava sett eitt óneyðuga langt áramál á hetta arbeiðið. Sjálvur heldur Hans Pauli skotbráið vera stutt, tí sum hann sigur:

- Veruleikin er, at arbeiðið fyri javnstøðu ikki er góðtikið allastaðni í samfelagnum. Summi fara í verjustøðu, onnur hava hug at øsa seg upp, tá prátið fellur á javnstøðu og javnstøðuspurningar. Summi vilja halda, at vit longu hava javnstøðu, og at tí er ikki neyðugt við politiskum tiltøkum. Somuleiðis eru umboð á tingi, sum ganga inn fyri javnstøðu, men sum ikki taka undir við javnstøðulógini sjálvari. Eisini tey vilja vera við, at javnstøða er í Føroyum, og at politiski mynduleikin ikki skal leggja uppí.

*Men er hesin negativi hugburðurin ikki ein ov stórur trupulleiki, til at landsstýrismaðurin kann gera sær nakran vónir um at fáa uppskotið samtykt?*

- At fólk hava aðrar meiningar, enn tú sjálvur, er í sær sjálvum ikki nakar trupulleiki. Men tað er ein veruleiki, sum øll, ið arbeiða fyri javnstøðumálum, mugu fyrihalda seg til í teirra útgangstøði. Uttan mun til, um vit halda tað vera rímiligt ella ikki, so er galdandi hugburðurin í samfelagnum ein fortreyt, vit mugu laga okkum eftir. Tað nyttar onki at koma við kravboðum og lidnum loysnum, sum partarnir fáa boð um at seta í verk alt fyri eitt. Ger man tað, hevur man ikki ein livandi kjans, tí man hevur spilt alt frá byrjan, sigur Hans Pauli.

Javnstøðu, men ikki javnstøðulóg.

*Men hví væntar tú, at títt uppskot fer at fáa eina øðrvísi móttøku?*

- Tí tað miðar ikki ímóti at diktera nakað við lóg. Tað leggur upp til kjak og eitt tvørpolitiskt samstarv millum flokkarnar og aðrar avvarandi partar, til dømis Kommunusamskipan Føroya, Javnstøðunevndina og Løgmannskrivstovuna. Tað finnast nógvar góðar kreftir, sum vilja arbeiða við javnstøðuspurningum. Endamálið er, at savna tær í eini tvørpolitiskari nevnd, sum sjálv skal gera av, hvussu arbeiðast skal fyri at røkka málunum. Eg havi longu hitt fólk, sum ikki taka undir við javnstøðulógini, men sum fegin vilja arbeiða fyri javnstøðu, og tí hava bjóða seg fram at vera við í hesi nevndini.

*Men um endamálið við uppskotinum ikki er ein lóg, sum skal áseta ein ávísan framferðarhátt ella eitt endamál, hvat skal hetta uppskotið so gera?*

- Tað skal fyrst og fremst syrgja fyri, at vit fáa eina semju um eina ítøkiliga virkisætlan fyri, hvussu vit skulu arbeiða fyri at fáa eitt javnari býti millum kynini á øllum tí politiska økinum. Sum heild eru fólk ikki ósamd um, hvørt vit skulu hava javnstøðu ella ikki. Men tey eru ósamd um, hvussu vit skulu røkka hesum endamáli.

*So vit skulu neyvan vænta okkum eitt uppskot um til dømis eitt helvtar kynskvotubýti?*

Tað hendir tað neyvan, tí kemur eitt slíkt uppskot á borðið í nevndini, vænti eg, at hon fer í tvíningar. Vit skulu minnast til, at í londunum, vit vanliga samanbera okkum við, hava tey havt javnstøðulógir síðani miðskeiðis í 70 unum. Síðani eru hesar lógir endurskoðaðar og broyttar og tillagaðar til tær skiftandi samfelagsumstøðurnar. Vit kunnu ikki vænta, at vit bara kunnu flyta hesar lógir beinleiðis yvir á tað føroyska samfelagið, sum hvørki hevur royndir ella nakra siðvenju á hesum økinum. Tað elvir bara til mótstøðu, og til eina enn meir negativa fatan av, hvat orðið javnstøða merkir.

### Positivt ja-orð.

Í fyrilestrinum minti Hans Pauli á, at tað framvegis eru fólk, ið hava lyndi til at snerkja at orðinum javnstøða, tí tey seta tað í samband við nakað grenjut og tvørligt.

- Fatanin av orðinum er eisini ein partur av tí veruleika, vit mugu hava í huga. Men eg trúgvi, at tað ber til at gera orðið til eitt positivt ja-orð, soleiðis at tað kemur at merkja framstig, menning og vøkstur ájavnt við dagsins positivu gandaorð, sum eitt nú kt-menning og gransking. Fara vit bara eini fimm ár aftur í tíðina, vóru hetta orð, vit neyvan rættiliga skiltu. Og vit hálvgum flentu, tá vit hoyrdu, at hesi hugtøk stóðu fyri stórum tilfeingis- og vakstrarvirðum. Nú ivast vit ikki í, at her liggja stórir møguleikar. Hetta prógvar jú, at tað ber til at broyta fatanina hjá fólki av einum lutfallsliga nýggjum orði og harvið hugburðin til, hvat tað inniber.

- Kunnu vit gera tað sama við orðið 'javnstøða', fær tað avgerandi týdning fyri, hvørja undirtøku vit kunnu vænta at fáa fyri javnstøðuarbeiðinum í framtíðini,

## Mentamálaráðið má taka seg saman

FORNMINNISSAVNIÐ
*Edvard Joensen*

Formaðurin í Magistarafelagnum heldur, at nú má Mentamálaráðið fáa skil á viðurskiftunum á Fornminnissavninum. Stig mugu nú takast, sum loysa málið einaferð fyri allar

Persónsstríðið á Fornminnissavninum er nú farið so vítt, at Magistarafelagið metir, at nú skulu munagóð stig takast beinanveg, so málið kann loysast endaliga.

Arne Thorsteinsson, fyrrverandi landsantikvarur, sigur, at hann er burturvístur av Fornminnissavninum av Steffeni Stumman Hansen, landsantikvari. Hetta avsannar landsantikvarurin. Men støðan er tann, at Arne Thorsteinsson ikki er til arbeiðis á Fornminnissavninum í løtuni.

Hóast royndir hevur tað ikki eydnast at fáa orð á teir báðar høvuðspersónarnar í hesum málinum til viðmerkingar. Heldur ikki á Mentamálráðnum vóru ábygdarpersónar at hitta, áðrenn blaðið fór til prentingar. Bæði landsstýrismaðurin við mentamálum, Jógvan á Lakjuni, og aðalstjórin á Mentamálaráðnum, Petur Petersen, vóru upptiknir á fundi fyrrapartin fríggjadagin.

Triðji partur í málinum er fakfelagið hjá Arna Thorsteinsson, Magistarafelagið, sum hann hevur vent sær til við málinum.

Bjarni Mikkelsen, formaður í Magistarafelagnum, sigur, at felagið nú bíðar efir einum útspæli, sum hann sigur eigur at koma frá Mentamálaráðnum.

Hann sigur, at Arne Thorsteinsson, hevur tosað við Mentamálaráðið og har fingið tey ráð at halda seg burtur frá Fornminnissavninum og verða heima.

–Men nú má Mentamálaráðið gera enda á hesum, sigur Bjarni Mikkelsen. Hann sigur, at eitt útspæl, sum eftir hansara tykki skal vera ein endalig loysn, eigur at koma mánadagin.

Hvat tann endaliga loysnin skal ganga út uppá, vil hann ikki geva nakað boð uppá. Men hann heldur ikki, at tað er nokk, at Mentamálaráðið skipar fyri skeiði í samstarvi ella slíkum fyri starvsfólkunum á Fornminnissavninum, sum hann tekur til.

*Framhald av síðu 4*

eina yrking, sum hann roynir at tekna. Áðrenn hvør fer til sítt verður loggbók skrivað.

Annan dagin aftan á morgunsang og lesiløtu verður greitt frá mannagongdini, tá ið farið verður at skitsa. Síðan fara øll í holt við at skitsa, onkur fer útum og onnur fara inn í stovuna. Arbeitt verður framvegis út frá eini yrking. Skitsan verður gjørd liðug og teknað á løriftið. Næmingarnir verða kunnaðir um litlæru, og um hvussu teir koma í gongd við at mála.

Mikumorgun er klárt at fara at mála. Dagurin byrjar sum vanligt, og síðan verður riggað til. Næmingarnir eru spentir og arbeiða miðvíst. Hildið verður fram at mála aftaná fríkorterið.

Aftaná matarsteðgin savnast øll í Skálanum, nú er Alexandur komin. Løtan byrjar við, at næmingarnir syngja tveir sangir við klaver- og kornettfylgispæli. Alexandur greiðir síðan frá, hvussu hann yrkir. Hann greiðir frá muninum millum ein sang og eina yrking og tosar um modernað skjaldur, tvætlirímur. Honum dámar at spæla sær við orðum og at finna orð, sum eru tvítýdd, og setir tey saman, so okkurt skemtiligt kemur burturúr. Alexandur lesur nakrar yrkingar úr nýggja savninum, sum kemur út í heyst, og næmingarnir fáa høvi at spyrja. Hugagóður svarar hann teimum skilagóðu spurningunum. At enda býtir hann næmingarnar sundur í yngri og eldri og gevur teimum uppgávur.

Yrkingarlagið hjá Alexanduri er við til at skerpa málsliga tilvitið hjá børnunum, og spennandi verður at vita, hvussu fer at gangast, tá ið tey skulu gera sínar egnu yrkingar. Málningurin skal gerast liðugur, og síðan skal alt gerast klárt til framsýningina. Leygardagin koma foreldrini í skúla.

Nú vikan er liðug hava næmingarnir lisið og skrivað, teknað og málað, sungið og yrkt, tingast og mett um. Soleiðis hevur skúlin roynt at møtt næminginum, har hann er staddur, og givið honum møguleika at menna seg í treysti til sín sjálvs og til felagsskapin.

Hvør nýggjur dagur er framhald av degnum fyri. Dagurin verður ikki tægaður sundur, og tá ið ringt verður fyri fríkorteri, hava næmingarnir einki annað í huganum enn at skula út at røra seg.

Sum nevnt fara næmingarnir í skúla leygardagin. Teir møta kl. 9.00. Foreldrini eru væl komin frá 10.00 til 12.00.

Framsýningin stendur eisini uppi mánakvøldið, 17. mai kl. 20.00, tá ið Sunda bókasavn skipar fyri kvøldsetu. Alexandur Kristiansen fer at greiða frá um skaldaverk sítt, yrkingar og týðingar, og Bárður Jákupsson, sum hevur myndprýtt bókina Grísaflísa-Pætur, tosar um tað at tekna til børn og um tekningar hjá børnum.

Øll eru hjartaliga væl komin, heilsa tey úr Norðskála/Oyra skúla á Oyrarbakka.

## Skeivir upplýsingar

Í týsdagsblaðnum stóð stubbi um eitt ferðsluóhapp í Kunoyarbergholinum. Gerast skal vart við, at upplýsingarnir, sum har stóðu ikki vóru heilt rættir.

Har stóð, at óhappíð hendi beint við tunnilsmunnan og at orsøkin helst var, at eini bilførarin varð blendaður av sólini. Men óhappið hendi við fjórða víkiplássið inni í tunlinum, og er tað tískil lítið sannlíkt, at sólin hevur havt nakað við óhappið at gera.

So skuldi hendan rættingin verið komin upp á pláss.

**- sae -**



UTTAN ÚR HEIMI

# Enn ein Gandhi



*Sonja Gandhi er tann fjórði indiski stjórnarleiðarin við Gandhi-navninum.*

**Stjórnarleiðarin í India eitur nú aftur Gandhi, og soleiðis hevur tað verið meginpartin av tíðini, síðani landið fekk sjálvræði**

INDIA
*Árni Joensen, fartekst@mail.dk*

Tað eru fá demokratisk lond, sum kunnu vísa á fýra stjórnarleiðarar við sama eftirnavni, men tað kunnu indarar aftan á tjóðartingsvalið, sum endaði hósdagin.

Tað er kortini ein munur á Mahatma Gandhi, Indiru Gandhi, Rajiv Gandhi og Sonju Gandhi. Tey trý fyrstu vóru av sama kjøti og blóði, men tað er Sonja Gandhi ikki. Hon var gift við Rajiv Gandhi, sum doyði, tá ein tamilskur sjálvmorðsbumbumaður myrdi hann í 1991.

Ein annar munur er eisini. Sonja Gandhi er ikki indari, men úr Italia, og júst hetta bleiv brúkt ímóti henni undir valstríðnum. Gamli stjórnarflokkurin hjá Atal Behari Vajpayee mælti indarum frá at velja ein útlending til stjórnarleiðara, men tað munti ov lítið.

Tann 58 ára gamla Sonja Gandhi ætlaði sær als ikki upp í politikk, eftir at maður hennara var myrdur. Hon tók seg av tí almenna pallinum, men í 1998 vendi hon aftur, og sama árið varð hon vald til formann í Kongressflokkinum. Á valinum nú stillaði sonur hennara, Rahul, upp, og so gjørdi hon av at gera tað sama.

Nú skal hon so leiða heimsins størsta demokrati. Undan hennara skeiði hevur ein Gandhi sitið í tí ovasta politiska sessinum í India í 44 av teimum 57 árunum, India hevur havt sjálvræði.

# Oljuprísurin setir met

**Ein fundur hjá OPEC-londunum tann 3. juni fer neyvan at broyta prísgongdina**

OLJUPRÍSUR
*Árni Joensen, fartekst@mail.dk*

Oljuprísurin hækkar støðugt.

Gjáramorgunin kostaði Brent-oljan 38,24 dollarar fyri tunnuna á marknaðinum í London, og á amerikanska marknaðinum kom prísurin heilt upp í 41,17 dollarar fyri tunnuna. So dýr hevur oljan ikki verið seinastu 21 árini, skrivar Reuters.

Eygleiðarar á altjóða oljumarknaðinum siga, at tann lutfalsliga stóri búskaparvøksturin kring heimin hevur elvt til størri eftirspurning enn væntað, og tað hevur trýst oljuprísin upp. Harafturat er tað ivasamt, at OPEC-londini fara at økja sína framleiðslu, og tað hevur eisini skrúvað prísin uppeftir.

OPEC londini framleiða í løtuni væl meiri enn tær kvoturnar, sum felagsskapurin hevur álagt limalondunum. Tann 3. juni hittast londini í Beirut. Eygleiðarar vænta, at tey fara at semjast um at hækka kvoturnar, men at tað kortini ikki fer at geva størri framleiðslu, av tí at framleiðslan longu er oman fyri kvoturnar, skrivar Reuters.

Eygleiðarar hava fyrr sagt, at oljuprísurin kann léttliga koma upp á einar 43 dollarar í summar.

## Bush hevur skyldina

Pápi tann 28 ára gamla amerikanaran, sum bleiv hálshøgdur í Irak fyri nøkrum døgum síðani, gevur George W. Bush, forseta og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra skyldina av, at sonurin bleiv avrættaður. Teir báðir hava skyldina av, at sonur mín varð avrættaður. Bush-stjórnin hevur skyldina, sigur pápin.

Hann heldur, at teir amerikonsku myndugleikarnir gjørdu ov lítið fyri at bjarga soninum, men myndugleikarnir avsanna, at teir kundu havt bjarga tí 28 ára gamla manninum.

Amerikanska fregnartænastan heldur, at tað var tann eftirlýsti yvirgangsmaðurin Abu Musab al-Zarqawi, sum hálshøgdi amerikanaran. Amerikanararnir hava leingi leitað eftir al-Zarqawi, og tann, sum kann avdúka, hvar hann er, fær tíggju milliónir dollarar í finningarløn. Enn hevur tað kortini ikki freistað nakran til at avdúka yvirgangsmannin, ið verður hildin at hava tætt samband við al-Qaeda.

## Hóttir OL

Ein víðgongdur grikskur felagsskapur, ið kallar seg "Kollveltingarligur bardagi", hóttir nú við at gera seg inn á tey, sum ætla sær til Athen í sambandi við teir olympisku summarleikirnar í august.

Í einari kunngerð hósdagin boðaði felagsskapurin frá, at tað var hann, sum sprongdi tvær bumbur nærhendis einari løgreglustøð í Athen tann 5. mai. Sama dag, sum kunngerðin kom, fann grikska løgreglan eina bumbu uttan fyri ein bretskan banka í grikska høvuðsstaðnum, og nakað seinni brustu tvey gasshylki uttan fyri ein grikskan banka í Athen-forstaðnum Voula.

Í kunngerðini frá tí higartil ókenda felagsskapinum stóð, at embætismenn, vinnulívsmenn, trygdarmenn og múgvandi ferðafólk, sum ætla sær til teir olympisku summarleikirnar, eru ikki vælkomin. Fyrr í vikuni boðaði grikska stjórnin frá, at 70.000 trygdarfólk skulu tryggja ítróttarfólkini og áskoðararnar.

## Brixtofte fær fleiri krøv

Ein sakføraravirki, sum hevur kannað embætisførsluna hjá fyrrverandi borgarstjóranum í donsku kommununi Farum, Peter Bristofte, mælir kommununi til at reisa endurgjaldskrav ímóti gamla borgarstjóranum.

Sakføraravirkið sigur í einari drúgvari frágreiðing, at kommunan eigur at krevja tríggjar milliónir krónur, sum Peter Brixtofte nýtti til vín, mat og ferðir í 2000 og í 2001. Í frágreiðingini siga sakførararnir beinleiðis, at Peter Brixtofte nýtti pengar hjá kommununi til egin áhugamál. Frammanundan hevur býráðið í Farum kravt, at gamli borgarstjórin skal endurrinda kommununi 925.000 krónur fyri misnýtslu við skattaborgarans pengum í 1998 og í 1999.

Sambært Jyllandspostinum kann tann einaferð so væl umtókti borgarstjórin vænta at fáa uppaftur fleiri krøv. Sakføraravirkið, sum hevur kannað embætisførslu hansara, nevnir í frágreiðingini, at grundarlag er helst eisini fyri at krevja endurgjald fyri eina ferð til Ísraels. Hetta var vorðið sum ferð, tí sambært sakføraravirkinum kostaði hon kommununi 409.000 krónur.

## Olja eftir í skipsvraki

Hildið verður, at meiri enn 100 tons av tungolju eru eftir í tangunum á einum kinesiskum farmaskipi, sum sakk við Bornholm fyri einum ári síðani.

Danska verjuleiðslan, sum hevur ábyrgdina í slíkum málum, heldur tað vera frægast at lata oljuna verða verandi í vrakinum, sum liggur á 35 favna dýpi. Tað heldur umhvørvisstýrið eisini. Stýrið sigur í einari frágreiðing, at tað er ikki serliga sannlíkt, at oljan fer at renna úr tangunum. Niðri á 35 favna dýpi er trýstið so stórt, at oljan verður trýst saman, sigur umhvørvisstýrið.

Umhvørvisverdnarfelagsskapurin Greenpeace heldur harafturímóti, at vandi er fyri, at oljan fer at renna úr tangunum á "Fu Shan Hai". Heimsnáttúrugrunnurin WWF kennir seg heldur ikki tryggan. Grunnurin sigur sambært Berlingske Tidende, at málið um oljun í tí kinesiska skipinum er enn eitt dømi um oljudálking í Eystrasalti, og at tað er ógjørligt at siga, hvørjar avleiðingarnar verða.